## Talvið hesa vikuna

Morozevich,A (2758) - Dreev,A (2698)
57th ch-RUS Moscow (2), 16.11.2004

1.e4 c5 2.Rif3 d6 3.d4 Rif6 4.Ric3 cxd4 5.Rixd4 Ric6 6.Bg5 Bd7 7.Be2 Fa5 8.Bxf6 gxf6 9.Rib3 Fg5! (Skiftir fokus) 10.g3 f5 11.f4 Fh6 12.Fd2 Bg7 13.0-0-0 fxe4 14.Rixe4 a5 15.Fe3 0-0 16.a3 Fe6 (Svartur er komin betur frá byrjanini. Hvítur fær ikki tíð at fara í álop) 17.Fd3 h6 18.Kb1 a4 19.Ric1 Rid4 20.Ric3 Rfc8 21.Ri1a2 (Morozevish er kendur sum ein álopssinnaður og fantasiríkur telvari, men nú má hann verja seg alt sum hann er mentur móti landsmanninum hjá sær) 21...Rixe2 22.Fxe2 Ff6 23.Fe3 Be6 24.Rib4 Rc4 25.Ribd5 Bxd5 26.Rxd5 Rac8 27.Rd3 b5! 28.Fc1 e6 29.Re1 d5 30.Re2 b4! (Gjøgnumbrotsleikurin. Hvítur hevur onga verju) 31.Rixa4 bxa3 32.Rxa3 Ra8 (Hvítur má geva riddaran fyri at sleppa undan skák og mát) 33.Rib6 Rxa3 34.Rixc4



Støðumynd eftir 34.Rixc4

34...dxc4! 35.Re4 (bxa3 Fa1 mát) 35...Ra4 36.c3 Ff5 0-1

### Úrslit og støður í FM-liðkappingini

**1. deild - 3. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| **Klaksvík** | **Hvalvík** | 3,5-0,5 |
| Ólavur Simonsen | Finnbjørn Zachariassen | 0,5-0,5 |
| Finnbjørn Vang | Martin Brekká | 1-0 |
| Rani Nolsøe | Sámal Christiansen | 1-0 |
| Tummas M. Anthoniussen | Kári Petersen | 1-0 |
| **Vestmanna** | **Toftir** | 3,5-0,5 |
| IM John Rødgaard | Wensil Højgaard | 1-0 |
| Samson Højgaard | Øssur Hansen | 1-0 |
| John Jacobsen | Helgi Joensen | 0,5-0,5 |
| Mogens Nielsen | Oddmar Andreasen | 1-0 |
| **Havnin** | **Kollafjørður** | 3,5-0,5 |
| Martin Poulsen | Hans Kristian Simonsen | 1-0 |
| Olaf Berg | Torbjørn Thomsen | 0,5-0,5 |
| Bogi Ziska | Eyðálvur Johannesen | 1-0 |
| Herluf Hansen | Bernhard Thomsen | 1-0 |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| 1. Klaksvík | 9,5 |
| 2. Havnin | 7,0 |
| 3. Vestmanna | 7,0 |
| 4. Kollafjørður | 5,5 |
| 5. Hvalvík | 4,0 |
| 6. Toftir | 2,0 |

**2. deild - 3. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| Sandavágur | Havnin A | 2,5-1,5 |
| Havnin A | Klaksvík | 1-3 |
| Vestmanna | Kollafjørður | 2-2 |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| 1. Klaksvík | 8,5 |
| 2. Sandavágur | 8,0 |
| 3. Havnin A | 7,5 |
| 4. Havnin B | 5,0 |
| 5. Kollafjørður | 4,0 |
| 6. Vestmanna | 3,0 |

# Tríggir stórsigrar



*Hans Kristian Simonsen og hinir kollfirðingarnir vóru fyri stórtapið í dystinum móti Havnar Telvingarfelag*

**Klaksvíkingar, havnarmenn og vestmenningar skaraðu framúr í triðja umfari í FM-liðkappingini**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Kappingin í ár fer uttan iva at standa millum fýra lið; Klaksvíkina, Havnina, Vestmanna og Kollafjørð. Soleiðis sær tað út eftir trý umfør og verður helst hetta eisini myndin restina av kappingini. Hvalvíkingar hava mangar ferðir blandað seg í ovaru helvt, men í ár tykist ikki sum teir hava eins nógvan viðvind sum teir plaga. Toftamenn flyta helst niður í 2. deild í ár.

### Suverent oddalið

Í Klaksvík vann heimaliðið ein knasandi 3,5 - 0,5 sigur á hvalvíkingum. Finnbjørn Zachariassen leikti javnt á 1. borði móti Ólavi Simonsen. Stórsigurin viðførir, at klaksvíkingar nú draga frá hinum liðunum. Longu eftir trý umfør, eru teir hálvttriðja stig fremstir.

Havnarmenn vunnu heldur óvæntað heili 3,5 - 0,5 á kollfirðingum. Havnarliðið er sterkt, men kollfirðingar hava eisini eitt væla lið við Hans Kristian Simonsen og Torbjørn Thomsen á odda. Uppgerðin millum vinmennirnar Martin Poulsen og Hans Kristian endaði við sigri til Martin. Ein kærkomin sigur til havnarmenn, sum sostatt yvirhálaðu kollfirðingar á stigatalvuni.

Vestmenningar vunnu væntaðan stórsigur á skerdum toftaliðið (uttan Jens Kristian Hansen) 3,5 - 0,5. Helgi Joensen bjargaði æruni hjá toftamonnum við javnleiki móti John Jacobsen.

Danin Mogens Nielsen leikti á 4. borði hjá vestmenningum. Mogens búleikast annars á Sandoynni, har hann í samstarvi við Talvsambandið, undirvísur í talvi. Áhugurin hjá ungdóminum á Sandoynni til talvítróttin er øgiligur, tí heili 78 børn verða undirvíst í trimum teimum størstu bygdunum, Sandur, Skopun og Skálavík. Eitt herðaklapp til Mogens og Talvsambandið fyri hetta átak.

4. umfar í liðkappingini verður 5. desembur.

### 2. deild

Klaksvíkingar eru ikki einans á odda í 1. deild. Í 2. deild hevur unga klaksvíksliðið tikið leiðsluna framanfyri m.a. sandavágsmenn. Fá stig skilja trý tey ovastu liðini. Sí úrslit og støður í aðrastaðni í blaðnum í dag.

### Russiski meistaraskapurin

Garry Kasparov tykist at hava funnið gamla stórformin aftur í sterkasta russiska meistaraskapinum síðani 1988. Hóast hann yvirsáð ein hampiligan lættan sigursleik í endatalvinum móti Alexander Motylev (2651), hevur Kasparov telvað væl og við nógvari orku. Hann er saman við Alexander Grischuk í oddinum. Grischuk hevur fýra stig fyri seks talv, meðan Kasparov hevur 3,5 stig fyri fimm talv. Ellivu telvarar taka lut og er tí neyðugt við fríumførum.

Svidler, Bareev og Morozevich eru nakrir av hinum luttakarunum. Felags fyri hesar tríggjar mætu telvarar er, at teir eftir seks umfør enn ikki hava blandað seg í oddastríðið.

Vladimir Kramnik, ið fyri mánaða síðani endurvann HM-heitið, avlýsti tíverri sína luttøku. Orsøkin var troyttleiki og stress eftir harða HM-dystin, sum eisini er vælskiljandi.

Ein sum tók øll á bóli varð Anatoly Karpov. 53 ára gamli fyrrverandi heimsmeistarin, sum ikki hevur telvað nógv seinastu árini, meldaði seg úr kappingini dagin fyri kappingarbyrjanini. Karpov vildi ikki geva nakra beinleiðis orsøk fyri óvæntaða og óhepna atburðin. Tey flestu gita, at hann einfalt ikki hættaði sær at telva móti slíkari sterkari mótstøðu.



KÍF-VÍF 20-32 (11-18):

# VÍF heldur kósini

**Kollfirðingar sluppu ikki at órógva vestmenningar, sum framvegis halda beina kós frameftir**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hava helst verið kollfirðingarnir, sum hava skapt størstu órógvina hetta kappingarárið. Hetta skilt soleiðis, at teir eru liðið, sum hava skapt mest óvæntaðu úrslitini.

Hetta er ikki minst komið væl við hjá VÍF, tí bæði H71 og Kyndil hava higartil mist móti KÍF. Kanska einamest, tí tey ikki tóku dystirnar í nóg stórum álvara, men tað mistakið gjørdi VÍF so ikki hesaferð.

Sunnudagin var nevnliga eingin sum helst ivi um, hvønn veg stigini skuldu fara. VÍF var sum so eisini ávarað, tí í fyrra dystinum millum liðini vóru vestmenningarnir beinleiðis hepnir, tá teir sluppu avstað við øllum.

Sunnudagin var tó skjótt greitt, hvønn vegin tað bar. Longu eftir tíggju minuttum hevði KÍF biðið um time-out, tí verjan snøgt sagt varð rend um koll, og tó at teir eftir hetta royndu at skipa seg betri, so vendist dysturin ikki.

VÍF bygdu støðugt upp á leiðsluna hjá, og tá farið varð undir seinna hálvleik, settu teir veruliga trumf á.



*Kollfirðingar royndu, men teir fingu ongantíð veruligt tak á VÍF sunnudagin*

Eftir tíggju minuttum av hesum stóð 12-25 á máltalvuni, og tó at VÍF eftir hetta gearaði nakað niður, so var allur ivi nú burtur.

### Hava nakað eftir

Úrslitið merkir, at VÍF framvegis er einsamalt oddalið í deildini, og tó at vit enn bara eru í grundspælinum, so fær hetta ikki verið annað enn ein hugalig staðfesting í Vestmanna.

At liðið so eisini eigur til góðar, at Sámal Joensen kemur aftur at spæla, og at venjingarstøðan hjá Áka Olsen spakuliga betrast, sigur eisini, at enn eru ikki allir trumfirnir spældir út.

Spurningurin er so, hvørt tað er nóg mikið til at halda fast í verandi støðuni. Í so máta eru viðhaldsfólkini helst nakað klókari um eina viku. Komandi sunnudag verður tað nevnliga Kyndil, ið kemur á vitjan. Fyrra dystin millum liðini vann Kyndil greiðan sigur, og spurningurin er so, hvørt vestmenningarnir nú eru tað pettið hvassari, ella um óstøðuga Kyndil tá enn einafeðr lyftir seg heilt upp.

KÍF spælir næstu ferð á heimavølli móti Neistanum, og so er spurningurin, hvørjum parti tað tá skal eydnast at toga seg nakað upp á talvuni.

**FAKTA UM DYSTIN**

**KÍF-VÍF 20-32 (11-18)**
**Málskjúttar**
**KÍF:** Regin Petersen 5(1), Eddie Joensen 5, Rógvi Weihe 3, Mirko Milenkvic 2, Petur Martin Poulsen 2, Gert Hansen 1, Kristjan Madsen 1, Jóan Pauli Olsen 1
**VÍF:** Ingi Olsen 10(2), John Zachariassen 7, Áki Olsen 4, Agnar Joensen 4, Karl Jóhan Durhuus 2, Harald Bjørgvin 2, Áki G. Olsen 2, Rúni Joensen 1
**Brotskøst:** KÍF 3, VÍF 2
**Útvísingar:** KÍF 5, VÍF 4
**Dómarar:** Brandur Johansen & Heri Petersen

VB-VÍF 31-14 (20-3):

# VÍF fekk smekk

**VB snøgt sagt hølvaði VÍF av sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir 40 minuttum í VB-høllini stóð 26-5 á máltalvuni. Eitt týðiligt tekin um klassamunin, sum var á liðunum báðum, sum dystaðust hendan dagin. VB hevði tá við fullari ferð víst, at liðið framvegis er millum tey allar bestu í føroyskum kvinnuhondbólti. Samstundis var staðfestingin enn einaferð, at VÍF í løtuni er langt frá liðnum, sum eitt tíðarskeið var mest sum einaráðandi í Føroyum.

Tølini tala helst eisini í ríkiligt mát fyri seg, tá dysturin skal viðgerast. Eftir sjey minuttum stóð 3-3 á máltalvuni, men so skrædnaði tað fullokomuliga. 27 minuttir skuldu ganga, áðrenn VÍF aftur skoraði. Tá hevði VB sent bóltin í kassan ikki færri enn 20 ferðir afturat, og so var tann ivin líkasum burtubeindur. Seinastu løtuna slapp VÍF at minka nakað um, munin, men meira enn kosmetiskt gjørdist tað so ongantíð.

**FAKTA UM DYSTIN**

**VB-VÍF 31-14 (20-3):**
**Málskjúttar**
**VB:** Daiva Toumaite 10(3), Aukse Vysniaskaite 8, Margreth Augustinussen 6, Rannvá Augustinsusen 2, Arnleyg Hjelm 2, Jacoba Poulsen 1, Laila Jespersen 1, Jóna Thorsteinsson 1
**VÍF:** Ioana Rápa 4, Linda Johannesen 3, Kirstin Helgadóttir 2, Fríða Marjunardóttir 1, Tórunn Jónálvsdóttir 1, Finngerð Jensen 1, Annfríða Helgadóttir 1, Eyðritt Andreasen 1
**Brotskøst:** VB 4
**Útvísingar:** VB 1, VÍF 2
**Dómarar:** Pole Hansen & Hartvig Joensen



*Tølini talaðu fyri seg, tá VÍF bókstaviliga varð bukað blátt og gult í Vági*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

StÍF-Kyndil 22-32 (10-15):

# Kyndil aftur á beint

**Meistararnir úr Kyndli tóku alt á Skála, og eru nú besta boðið upp á ein kappingarneyta hjá VÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir tapið fyri H71 seinast, vóru boðini til Kyndils-leikararnar greið sunnudagin. Ein sigur á StÍF var krav, um sambandið við oddaliðið úr VÍF ikki skuldi detta heilt burtur.

Hinvegin vildu strandingar sjálvsagt eisini hava ein sigur. Bæði tí liðið nú so smátt er um at isolerast í botninum, men so sanniliga eisini sum eitt slag av hevnd til Kyndil, sum meira ella minni læt StÍF úr, tá liðini hittust í fyrra sínamillum dystinum í grundspælinum.

### Skrædnaði um steðgin

Fyrsta partin av dystinum sá eisini út til, at talan skuldi gerast um trupla uppgávu hjá Kyndli. Strandingar tóktust tendraðir til dystin, og fyrstu tjúgu minuttirnar var millum lítið og einki, sum skilti partarnar.

Seinastu løtuna undan steðginum skrædnaði tó eitt sindur. Frá 9-9 broyttist støðan til 10-15, og so megnaði StÍF ongan tíð aftur at skapa nakran spenning. Kyndil helt við skilagóðum spæli fast um leiðsluna. Teir tóku eingi óráð fyri, og einsamallur megnaði Sveinur Justinussen ikki at høgga nóg nógvar bóltar í kassan, soleiðis at munurin kundi minkast.

### Aftur á beint

Og so stendur greitt, at Kyndil nú aftur er um at koma á beint. Higartil í ár hava teir bæði heil- og hálvkiksað móti ávíkavist KÍF og H71, og higartil hevur tað kostað, at VÍF hevur skrætt seg leyst í oddinum.

Hinvegin hevur spælið hjá Kyndli í øðrum dystum – eitt nú í heimadystinum móti VÍF – verið av slíkum slag, at fáur man ivast í, at liðið aftur í er eitt av teimum, sum skulu takast heilt alvorliga, tá tosað verður um FM-biðlar.

Strandingar tykjast hinvegin ganga í sama sporinum. Tað ræður um at byggja nýtt upp, og so má tað bara takast við, at tað kostar í úrslitunum í ár.

**FAKTA UM DYSTIN**

**StÍF-Kyndil 22-32 (10-15)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Sveinur Justinussen 12(3), Pauli Hansen 3, Leivur Justinussen 2, Alexandur Johansen 2, Artur Johansen 1, Bárður Danielsen 1, Borgar Danielsen 1
**Kyndil:** Josef Abrahamsen 9(3), Finnur Hansson 5(1), Jakob Jónsson 4, Hans Áki Dal Christiansen 4(2), Høgni Klein 3(1), Ragnar Stakksund 2, Hans Arni Thomsen 2, Rókur Akralíð 2, Hjalti M. Jacobsen 1
**Brotskøst:** StÍF 6, Kyndil 10
**Útvísingar:** StÍF 7, Kyndil 6
**Dómarar:** Kristian Johansen & Dánjal Samuelsen